Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Liljan Weihe, løgtingskvinna

Svarari: Djóni Nolsøe Joensen, landsstýrismaður í barna- og útbúgvingarmálum

Evni: Kanning um børn og ung, sum eru send av landinum

Spurningar:

1. Hvussu nógv børn og ung eru send av landinum síðani apríl 1975, tá umsitingin av barnaforsorgini bleiv flutt til Føroya?
2. Hvussu nógv børn eru send av landinum, síðani Føroyar fingu egna lóggávu á barnaverndarøkinum í 2006?
3. Vil landsstýrismaðurin seta eina kanning í verk um handfaringina av hesum persónum, sum seinastu 50 árini eru send av landinum?

Viðmerkingar:
Í 50 ár hava vit havt ábyrgd av barnaverndarøkinum. Umsitingin av barnaforsorgini kom á føroyskar hendur í 1975, og í 2006 varð málsøkið yvirtikið, og vit fingu føroyska lóggávu á økinum.

Áðrenn føroyska barnaverndarlógin kom, var økið umsitið eftir danskari lóg um barnaforsorg, sum var sett í gildi í Føroyum í 1960. Lógin hevði sín uppruna í donsku forsorgarlógini frá 1933.

Hóast umsiting og lógarverk hevur verið á føroyskum hondum eina hálva øld, so senda vit framvegis børn og ung av landinum, tí vit siga okkum ikki megna at taka okkum av teimum.

Tað er trupult at fáa neyvt innlit í barnaverndarøkið í Føroyum. Bæði tí økið er sárt og privat, men eisini tí umsitingin er býtt millum land og kommunur. Ein frágreiðing er skrivað um barnaforsorgina í 2000, men tað er sera ringt at fáa innlit í, hvussu nógv børn og ung eru send av landinum av føroyskum myndugleikum seinastu hálvu øldina, tí vit ikki hava raðfest at hava nøktandi tilboð til tey í Føroyum.

Ein kanning av barnaverndarøkinum seinastu 50 árini kann geva okkum innlit í fortíðina og virðismikla vitan um, hvussu økið kann skipast frameftir.

Á Løgtingi, 16. september 2025

Liljan Weihe